**LØGMÁLARÁÐIÐ**
MINISTRY OF JUSTICE

Sjóvar kommuna
Skúlavegur 10
490 Strendur

Tórshavn, tann: 7. juni 2024
J. nr.: 24/14711-2
Viðgjørt: EA

**Viðvíkjandi umsókn um frávik frá ásetingini í § 7 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.**

Sjóvar kommuna hevur við teldubrævi, dagfest 5. juni 2024, søkt Løgmálaráðið um frávik frá ásetingini í § 7 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Orsøkin er, at Sjóvar kommuna í november 2022 beyð tvey grundøkir til íbúðarbygging, matr.nr. 79bs og 79bt, til sølu, men ikki fyrrenn nú í juni 2024, vegna drúgva fyrireiking av verkætlanini, er til reiðar at gera bindandi avtalu við keypara av grundøkjunum.

§ 7 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn ásetur:

> "**§ 7.** Er eitt ár liðið síðani fastogn seinast varð lýst til sølu, kann ognin einans verða seld, um hon verður boðin út alment av nýggjum."

Ásetingin í § 7 í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn er lík ásetingini í § 9 í bekendtgørelse om offentligt udbud ved salg af kommunens og regionens faste ejendomme.

Sambært vegleiðing til ásetingina, VEJ nr. 9175 af 03/03/2021, er eitt árs freistin í § 7 í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn endalig. Hetta er eisini galdandi í teimum førum, har kommunan er farin undir samráðingar um sølu við áhugaðan keypara, áðrenn eitt árs freistin er farin. Avgerandi er, um bindandi avtala um sølu av ognini er gjørd, áðrenn eitt árs freistin er farin.

So vítt Løgmálaráðið dugir at síggja, hevur Sjóvar kommuna ikki gjørt bindandi avtalu um sølu av omanfyri nevndu grundøkjum, innan eitt árs freistin fór.

Vísandi til omanfyristandandi kann Løgmálaráðið ikki geva Sjóvar kommunu frávik frá ásetingini í § 7 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Um Sjóvar kommuna framvegis ynskir at selja ítøkiligu grundøkini, má Sjóvar kommuna tí bjóða grundøkini út alment av nýggjum.

Elinborg Apol
fulltrúi